UTTAN ÚR HEIMI

## Ráðharrar bróta mannarættindi

Ein mannarættindafelagsskapur í Afghanistan vil vera við, at fleiri av landsins ráðharum og ovastu embætismonnum geva boð um at handtaka tilvildarlig fólk, og at fleiri fangar verða píndir.

Felagsskapurin sigur seg hava skrásett 634 brot altjóða reglurnar um mannarættindi hetta seinasta árið. Umframt tilvildarligar handtøkur og píning snýr tað seg um neyðtøkur, burturflytingar og ólógligar ognartøkur. Millum annað skal trygdarovastin í landspartinum Herat hava givið boð um at pína fangar, og so seint sum í seinastu viku gav trygdarovastin í høvuðsstaðnum Kabul boð um at javna 30 hús við jørðina, tí ætlanin er at byggja bústaðir til embætismenn har.

Afghanski mannarættindafelagsskapurin sigur, at teir flestu, sum standa fyri harðskapinum, eru úr teirri fyrrverandi Norðursamgonguni, sum gekk undan í bardaganum ímóti Taliban-stýrinum fyri tveimum árum síðani, og sum hevur fleiri ráðharrar í stjórnini hjá Hamid Karzai, forseta.

## Estland í ES

Sunnudagin var fólkaatkvøða í Estlandi um limaskap í ES, og sum væntað var stórur meiriluti fyri limaskapinum.

66,9 prosent atkvøddu fyri at fara upp í ES, meðan 33,1 prosent vóru ímóti, kunngjørdi almenna valnevndin sunnukvøldið. Valluttøkan var 63,4 prosent, og tað er lutfalsliga nógv í Estlandi, verður sagt.

Juhan Parts, forsætisráðharri, var sera fegin um úrslitið sunnukvøldið. Hann helt fyri, at Etsland er komið til Evropa, og at landið verður verandi her. Hann segði, at úrslitið av fólkaatkvøðuni tryggjar landsins demokratisku skipan, men at fólkið í Etslandi eigur kortini at gera sær greitt, at alt verður ikki gott, bara tí landið fer upp í Evropasamveldið.

## Russiskar kvinnur drekka verri

Seinastu árini er talið á russiskum kvinnum, sum drekka, meiri enn gott er, vaksið nógv, siga læknar og onnur, sum kenna trupulleikarnar. Samstundis vísir tað seg, at tær flestu drekka í loyndum.

Alexej Magalif, sum er leiðari á einari avrúsingarstøð í Moskva, sigur, at bæði múgvandi og fátækar kvinnur drekka meiri øl, vín og brennivín nú, enn vanligt var fyri bert fáum árum síðani. Tað hevur eisini víst seg, at nógvar kvinnur, sum fáa ringa viðferð við hús, velja sær rúsdrekka til stimbur, sigur hann.

Russisku serfrøðingarnir siga, at eisini nógvar ungar kvinnur gera ov nógv við tað váta slagið. Tað hevur gjørt, at fleiri felagsskapir hava mótmælt einari ætlan um, at bryggjaríini skulu fáa loyvi til sølufremjandi tiltøk, sum eru beinleiðis ætlað teimum ungu í Russlandi.

## Nýttu tunnil til smugling

Í Meksiko hevur løgreglan funnið ein tunnil undir markinum til USA, og hildið verður, at smuglarar hava nýtt tunnilin til at smugla rúsevni ígjøgnum. Higartil eru seks fólk tikin í málinum.

Tunnilin, sum er 300 metrar langur, var millum meksikanska býin Nogales og amerikanska býin Nogales í statinum Arizona. Í tunlinum, sum er tveir metrar breiður og tveir metrar høgur, er ein jarnbreyt, sum smuglararnir hava flutt plattar við rúsevni eftir, sigur løgreglan. Hildið verður, at tað eru serliga kokain og marihuana, sum er farið ígjøgnum tunnilin úr Meksiko til USA.

Meksikanska løgreglan hevur illgruna um, at teir seks tiknu menninir hava arbeitt fyri smuglarakongin Joaquin Guzman, sum har á leiðini gongur undir navninum "El Chapo". Hann sat í einum væl vardum meksikonskum fongsli, men slapp til rýmingar fyri tveimum mánaðum síðani.

# Svøríki fær minni ávirkan í ES í framtíðini

**Sviar fara at missa ávirkan í ES, nú teir søgdu nei til at fara upp í evrusamstarvið.**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Gøran Persson, forsætisráðharri, royndi sunnukvøldið at leggja dent á, at sviar høvdu sagt nei til evruna, men ikki til ES.

Men úrslitið sunnudagin fer eftir øllum at døma at ávirka svenska limaskapin í ES kortini. Í hvussu er var formaðurin í ES-nevndini, Romano Prodi, ikki í iva, tá svenska sjónvarpið spurdi hann, um úrtslitið fer at ávirka støðu Svø´ikis í samveldinum.

- Tað er eingin ivi um, at svenska avgerðin fer at bera í sær, at landið fær minni ávirkan í ES, svaraði ein avgjørdur Romano Prodi. Hann segði, at hann í síðstu viku hevði verið á einum fundi um búskaparligu viðurskiftini í ES í framtíðini, og at har var Svøríki ikki við í myndini.

Leiðandi politikarar í ES-londunum duldu heldur ikki fyri, at teir vóru vónbrotnir av svenska úrslitinum. Týski kanslarin, Gerhard Schrøder, segði, at tað hevði tænt bæði Svøríki og ES, høvdu sviar sagt ja, tí tað ber ikki til at fáa fulla nyttu av teimum nógvu møguleikunum á evropeiska marknaðinum uttan eitt felags gjaldoyra, segði Schrøder.

Í ES-tinginum vóru fólk eisini vónbrotin. Formaðurin í tí konservativa tingbólkinum, Hans-Gert Pøttering, viðgekk, at hann var sera vónbrotin, og hann segði seg ikki ivast í, at teir flestu ES-borgararnir høvdu somu áskoðan sum hann. Graham Watson, sum er formaður í tí liberala tingbólkinum, var eisini vónbrotin. Hann helt, at svenska stjórnin hevði ikki megnað at sannføra veljararnar um teir nógvu fyrimunirnar, sum evrusamstarvið ber í sær.

Í Danmark fylgdu politikararnir væl við svensku fólkaatkvøðuni. Í sjónvarpinum sunnukvøldið vildi Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, ikki siga nakað um, nær danir skulu taka støðu til evruna, men hann legði tó afturat, at spurningurin um danska luttøku í evrusamstarvinum fær uppaftur størri týdning, tá tey nýggju limalondini koma uppí næsta ár.

Teir donsku politikararnir, sum eru ímóti evruni, vóru sum vera man væl nøgdir við svenska úrslitið.



*Í amerikonskum valstríði verða allar snildir nýttar. Her hevur Bill Clinton fingið sær ein smábarn í føvningin, meðan hann prátar við Gary Davis, guvernør*

# Clinton ímóti Arnold

**Demokratarnir í Kalifornia hava sett øll segl fyri at forða fyri, at Anrold Schwarzenegger skal vinna guvernørvalið.**

USA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Seinasta demokratiska stigið í royndunum at bjarga guvernørinum Gary Davis er fyrrverandi forsetin Bill Clinton.

Tann pallvandi Clinton, sum ber orð fyri at hava serlig evni at rúnarbinda sínar áhoyrarar, vendi sær serliga til minnilutabólkarnar í Kalifornia, júst sum hann plagdi at gera, tá hann sjálvur rak valstríð. Hann ávaraði kaliforniska fólkið ímóti republikanarunum og segði, at teir vilja einans hava vald.

Millum teirra, sum royna at gerast guvernørur í Kalifornia, er filmsleikarin Arnold Schwarzenegger. Tær seinastu meiningakanningarnar geva honum 25 prosent av atkvøðunum, og hann er sostatt á øðrum plássdi aftan fyri varaguvernørin, demokratin Cruz Bustamente.

ítróttur

Nr. 174 • týsdagur • 16. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# ÍF annað beinið í bestu deildini



*Tvøramenn fingu ikki steðgað fuglfirðingunum, sum nú hava meira enn hálvt annað bein í bestu deildini*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

2. DEILD TB–ÍF
*Jóannes Hansen*

Tað skal vilja meiri enn illa til, um tað ikki fer at eydnast hjá ÍF. Teir hava alt kappingarárið verið fremstir í næstbestu deildini, og leygardagin tóku teir eitt stórt fet ímóti 1. deild, har teir ikki hava átt pláss síðani í 1999.

Hesa ferð vóru teir á Tvøroyri, har einasta liðið, sum tóktist eiga einasta møguleikan at taka ÍF aftur, ikki megnaði at standa royndina.

ÍF vann 5–2, og venjarin, Sigfriður Clementsen, orðar tað soleiðis:

– Vit hava trýggjar match bóltar, og kanska fáa vit hjálp frá onkrum øðrum, sum hevur møguleika at vinna á teimum, sum eru aftanfyri okkum. Men tá ið tað hevur roynst so væl higartil, sum tað hevur, so eiga vit sjálvir at vera menn fyri at syrgja fyri uppflytingini, heldur ÍF venjarin, ið sigur seg vera sera væl nøgdan við sínar spælarar leygardagin.

TB kom á odda, tá ið ÍF miðverjin, Viggo Johannesen, var so óheppin at fáa flatt innlegg á fótin, men ÍF svaraði skjótt aftur.

Høgni Zachariasen sendi úr 21 metrum og eitt vet til høgru fríspark í handara síðunetið, tá ið tað restaðu tíggju minuttir av fyrra umfarinum.

Í 2. hálvleiki leikaði tað leingi javnt á. Men tá ið ÍF hevði lagt seg framum gekk tað skjótt. Hanus Eliasen fór ímillum Óla Johannesen og Jon Johannesen og setti framvið málverjanum. Tá restaðu tað tjúgu minuttir, og sjey minuttir seinni var 4–1. Triðja málið skoraðiKen Bærentsen upp á brotsspark, eftir at Hanus Eliasen varð feldur, og fjórða málið skoraði Eyðolvur R. Petersen. TB rangstøðufellan hjá TB kiksaði, Eyðolvur gjørdist leysur úr høgru og lyfti hegnisliga upp um málverjan, tá ið hesin kom út ímóti.

Óli Johannesen stútaði til 4–2 eftir horna, og Høgni Zachariassen setti punktum fyri sannførandi ÍF sigri. TB misti bóltin, tá ið teir vóru á veg í álop, og miðvallarin Høgni Zachariassen, sum megnar sera væl at sparka til bóltin, sendi úr fjøruti metrum og upp um málverjan. Ei undur í, at ÍF legan stórfegnaðist.

Leygardagin fær ÍF vitjan av AB, so skulu teir til Leirvíkar, áðrenn teir runda av við Sumba á heimavølli. Tá fara fuglfirðingar heilt víst at fáa gullkrónurnar um hálsin, tí teir hava vunnið næstbestu deildina. Hvussu tað fer at hilnast í bestu deildini fer at valdast um fyritreytirnar. Einki er at ivast í, at í Fuglafirði eru teir longu farnir at hugsa um næsta kappingarár.

Á Tvøroyri vóna teir framvegis, at tað skal bera til at vinna næstfremsta plássið. Nú skulu teir vil Vágs, so fáa teir vitjan av KÍ, áðrenn teir í síðsta umfarinum skulu til Sands.

**TB–ÍF 2–5 (1–1)**

1–0: sjálvmál
1–1: Høgni Zachariassen
1–2: Hanus Eliasen
1–3: Ken Bærentsen br
1–4: Eyðolvur R. Petersen
2–4: Óli Johannesen
2–5: Høgni Zachariassen

